LM-099/2023

Fylgiskjal 16

Hoyringssvar til "Uppskot til Løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu"

Tórshavn 19.2.2024

Førðya Ferðaleiðarafelag heldur uppskðtið vera skilagðtt. Allir setningar mugu vera heilt greiðir, ðg bert kunna tulkast á ein hátt, fyri at sleppa undan misskiljingum.

Í øllum lógarásetingum, har "ferðaleiðari" kemur fyri, má standa "førðyskur ferðaleiðari". Fyri at vera ferðaleiðari er minsta krav, galdandi víðkað 1.hjálparskeið.

Ein førðyskur ferðaleiðari er ein trygd fyri einari góðari uppliving ðg neyvari kunning til tey ferðandi. Eisini vil ein førðyskur ferðaleiðari duga at fara hóvliga fram fyri at órógva sum minst. Førðyskir ferðaleiðarar fáa góð skðsmál frá útlendingum ðg serliga frá cruise gestum. Ofta siga cruise gestir at "í Førðyum hava tey havt tann mest infðrmativa ferðaleiðaran á allari ferðini".

Útlendskir (tó ikki nðrðurlendskir) ferðaleiðarar kunnu sambært SIRI søkja arbeiðslðyvi, ðg harvið vera ferðaleiðarar í Førðyum. Her mæla vit til, at førðyskur ferðaleiðari eigur at vera eitt krav, tá farið verður út um bøgarðarnar. Kanska nðrðurlendskir ferðaleiðarar eisini skulu hava førðyskan ferðaleiðara við uttanfyri bøgarðarnar á ávísum støðum. Higartil hevur ðnki eftirlit verið við útlendskum ferðaleiðarum ðg bussførarum, tvs. um tey hava arbeiðslðyvi ella ikki. Vanligt er aðrastaðni at tú SKALT hava lðkalan ferðaleiðari við, eisini í bussi.

Viðvíkjandi gildiskomu:

Í ferðavinnuni er tað soleiðis, at arbeitt verður við at selja upplivingar fram í tíðina. Ofta verður farið út við prísum í seinasta lagi tíðliga í september at galda fyri árið eftir. Tí er rímuligt, at ferðasmiðir hava nøktandi tíð til at taka broyttar umstøður við í teirra marknaðarføring og prísáseting.

Sambært lógaruppskotinum skulu Ferðavinnuætlanirnar verða lidnar 1. juni 2025. Vit mæla til, at Landstýrismaðurin og umsiting hansara eru klár við tilhoyrandi kunngerðum áðrenn august 2025 er lokin. Lógin kann tá vera galdandi frá 2026 at rokna, og ferðasmiðir eru kunnaðir um galdandi ferðavinnuætlanir í góðari tíð.

Vit takka fyri at vit vóru hoyringspartur.

Vinarliga

Føroya Ferðaleiðarafelag

nevndin